**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Svartkalvi. Túrur nr. 2022.**
**Tíðarskeið: 27/5 - 10/6 - 2020.**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul J. Vestergaard, Marit Pedersen og Fróði Skúvadal.

**Ábyrgd:** Fróði Skúvadal (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru tiknir av svartkalva, toski, upsa, longu, blálongu og brosmu. Myndir av bróskfiski (skøtum) vóru tiknar.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Vágshurðar. Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar. Miniloggarar vórðu nýttir til at máta sjóvarhita í trolinum.

**Um túrin:**

Fóru av Havnini hóskvøldið 28/5 kl. 2000 og byrjaðu at royna við Kápulin eystanfyri, so skjótt sum vit komu á fiskileið. Síðani fóru vit vesturum og gjørdu nøkur hál í vestara kanti. Eftir tað fóru vit á Munkagrunnin og tóku nøkur hál har. Síðani varð siglt norður til landnyrðingskantin. Har lógu vit og tóvaðu vestureftir tað mesta av túrinum. Fríggjadagin 05.06 øtlaði hann veðrið av norði. Tá varð avgjørt at halda suðureftir og leggja bakk. Vit lógu bakk frá fríggjadegnum til sunnudagin 07.06, tá ið kastað varð aftur við kápulin sum er eystanfyri Suðuroyarbanka. Har gjørdu vit nøkur hál og fóru so aftur no rð í kantin í ein landnyrðing úr Fugloynni. Har lógu vit restina av túrinum. Kl. 1400 hin 09.06 hálaðu vit seinastu ferð á túrinum og fóru síðani at sigla inn. Landað var til Barðið um 08 tíðini mikumorgunin 10.06. Sum heild varð veðrið gott á túrinum, uttan teir dagarnar tá ið vit lógu bakk.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin verður liðugt rættaður eina viku eftir at hann er lokin.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl minni at fáa av svartkalva enn vanligt hevur verið seinastu árini (Mynd 1). Hesaferð vóru fingin um 11 tons í tvær vikur minus teir dagarnar vit logu bakk. Árini 1995 – 2020 vóru í miðal fiskaði 117 kg av svartkalva um tíman á heusm túri. Í 2020 vóru fiskaði um 65 kgav svartkalva um tíman, uml. helvtina so lítið sum miðal. Um veðrið hevði verið til vildar allar dagarnar, so høvdu vit møguliga komið upp á sama støðið sum áðurnenvndu ár. Nakað varð fingið av toski. Fleiri magar vóru kannaðir á túrinum. Føðin hjá svartkalva var í høvuðsheitum svartkjaftur, onkur hevði etið sild og onkur nakað av krilli. Hjá hinum fiskasløgunum, har magar eisini vóru kannaðir, var høvuðsføðin eisini svartkjaftur.
Í Talvuni á næstu síðu (Talva 1) síggjast tal av nytrum, magum og nøgdirnar av høvuðsfiskasløgunum fingin á túri 2022. Myndir av 7 skøtusløgum vóru tiknar.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar av ymsum slagi eru at finna í imponatorútskriftini, eins og í skjalinum ”Rættingar túr 2022”.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 2022, fyribils úrslit.

| Fiskanavn | Nytrar | Magar | KG | kg/tíma |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 435 | 91 | 11374.22 | 65.70894 |
| TINDASKØTA | | | 1861.75 | 10.75534 |
| HALAHVASSA SKØTA | | | 831.047 | 4.800965 |
| TRANTKONGAFISKUR | | | 746.709 | 4.313744 |
| BLÁLONGA | 43 | 7 | 722.708 | 4.17509 |
| STÓRI KONGAFISKUR | | | 477.431 | 2.758122 |
| GULLAKSUR | 1 | 1 | 246.006 | 1.421179 |
| LÁLLA | | | 181.334 | 1.047568 |
| BROSMA | 44 | 1 | 171.835 | 0.992692 |
| SKØTA | | | 164.025 | 0.947574 |
| TOSKUR | 23 | 7 | 162.94 | 0.941306 |
| SVARTASKØTA | | | 159.703 | 0.922605 |
| UPSI | 11 | 2 | 128.4 | 0.741768 |
| BLÁGÓMUR | | | 122.999 | 0.710566 |
| LONGA | | | 122.18 | 0.705835 |
| SVARTKJAFTUR | | | 65.39 | 0.377759 |
| KLINGRUSKØTA | | | 36.49 | 0.210803 |
| HAVTASKA | | | 29.48 | 0.170306 |
| LIRI | | | 26.99 | 0.155921 |
| GRÓT | | | 22.181 | 0.12814 |
| NAGLASKØTA | | | 19.85 | 0.114674 |
| LÍTLA BROSMA | | | 19.239 | 0.111144 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | | | 18.999 | 0.109757 |
| STEINBITUR | | | 17.115 | 0.098873 |
| NEBBASKØTA | | | 17.045 | 0.098469 |
| GAMAL FISKUR | | | 15.88 | 0.091739 |
| ULVFISKUR | | | 13.103 | 0.075696 |
| HVASSASPREK | | | 12.991 | 0.075049 |
| SPÍSKASKØTA | | | 11.16 | 0.064471 |
| HVALSPÝGGJA | | | 8.833 | 0.051028 |
| RÌSNA LANGASPORL | | | 5.219 | 0.03015 |
| KRYTTLINGUR | | | 4.144 | 0.02394 |
| SANDSPROEKA | | | 2.953 | 0.01706 |
| HÝSA | | | 1.39 | 0.00803 |
| MORA FISKUR | | | 1.075 | 0.00621 |
| GÁGGA | | | 0.868 | 0.005014 |
| SILD | | | 0.82 | 0.004737 |
| KUBBUTA LANGASPORL | | | 0.61 | 0.003524 |
| KALDI ÚLVFISKUR | | | 0.61 | 0.003524 |
| IGULKER | | | 0.572 | 0.003304 |
| LOLIGO | | | 0.435 | 0.002513 |
| KROSSFISKUR | | | 0.141 | 0.000815 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | | | 0.075 | 0.000433 |
| RÆKJA | | | 0.025 | 0.000144 |




**Mynd 1** Kg av svartkalva um tíman. Miðalveiðan fyri árini 1995-2020 sæst sum ein stiplað strika. Í 2020 var veiðan uml. helvtina av miðal.

<u>Fróði Skúvadal</u>